## Jóhanna heldur fram

Jóhanna Køtlum varð á aðalfundi í gjárkvøldið afturvald sum forkvinna í Almanna- og heilsuróktarfelagnum. Jóhanna Køtlum forkvinnan stóð fyri vali og var afturvald. Hon hevur verið forkvinna í hálvt ár, men valið er annars fyri tvey ár. Fyri vali í nevndini stóð Sunrid berg og Eyðna Hansen, sum báðar vórðu afturvaldar.Hinir nevndarlimirnir eru næstforkvinna Anna Britt Eið og Katrin Biskupstø. Katrin Biskupstø var nýggj vald.Tiltakslimir eru Beinta Danielsen og Meta C. Palle.Í Almanna-og heilsuróktarafelagnum eru 270 limir. 102 limir vóru møttir upp til fundin.



## Bill flaggrøðu í Runavík

Flagdagshaldið í Runavík verður á økinum sunnan fyri Býráðshúsið flaggdagin klokkan 15. Bill Justinussen, løgtingsmaður, flytir fram røðu, Nes Sóknar Hornorkestrið spælir og skótarnir, Tjaldur, Nsí, Støkk, Nsí kappróðrafelagið, Skála ítrottafelag, Skála róðrafelag ganga skrúgongu. Til ber at keypa sær okkurt gott frá skótunum. Skrúðgongan fer frá Glyvra skúla klokkan 14.30 Ítróttafólk og Skótar verða biðin um at møta 14.15 við Glyvra Skúla.

# Léttari at søkja listastuðul

**Talið á umsóknum til Kulturkontakt Nord um listarligan stuðul tykist at økjast munandi, nú stovnurin hevur gjørt tað léttari hjá listafólki at senda inn umsóknir**



*Við nýggju møguleikunum at søkja stuðul frá Kulturkontakt Nord vónar stjórin, Bergljót Jónsdóttir, at fáa tættari samstarv við listafólk í Norðurlondum*

MENTAN
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*
*myndir: Jens K. Vang*

Alt bendir á, at nýggi bygnaðurin í stovninum fyri norðurlendskt mentanarsamstarv, Kulturkontakt Nord, hevur stimbrað hugin hjá listafólki at søkja stuðul úr stovninum. Bara higatil í ár eru heilar 335 umsóknir komnar inn í mun til 706 umsóknir alt árið í fjør. Og enn eru fleiri umsóknarumfør eftir at troyta restina av árinum.

### Meir opin stovnur

Tað var eisini millum annað fyri at létta um mannagongdina at søkja stuðul, at stovnurin var umskipaður fyri tveimum árum síðani. Undir gomlu skipanini skuldu umsøkjarar søkja stuðul úr ymsum grunnum, sum umboðaðu hvør sína listagrein. Hetta gjørdi ofta umsitingina óneyðuga tunga og dýra. Í dag verður søkt um stuðul í tráð við verkætlan, heldur enn listagrein, umframt at alt fer fram umvegis internetið.

- Hetta ein roynd at skapa meir opinleika kring stovnin og harvið gera tað meir lokkandi hjá listafólki at venda sær til okkara við sínum verkætlanum og hugskotum, sigur Bergljót Jónsdóttir, stjóri á Kulturkontakt Nord.

Fyri at gera frástøðuna millum Kulturkontakt Nord og einstøku listafólkini enn minni eru eisini verkætlanarleiðarar settir sum umboð fyri stovnin í teimum ymsu Norðurlondunum. Verkætlanarleiðari í Føroyum er Urd Johannesen.

- Mín uppgáva er millum annað at kunna listafólk í Føroyum um teir ymsu stuðulsmøguleikarnar og vegleiða tey, tá tey ætla at senad umsóknir inn, sigur Urd Johannesen, sum heldur, at tørvurin á einum slíkum millumliði kanska er serliga stórur í Føroyum.

- Føroysk listafólk eru ikki skipað undir stovnum og feløgum, sum tey ofta eru aðrastaðni. Í Føroyum arbeiða listafólk ofta meir einsæris og spjadd, og tað setir onnur krøv til kunningarhættir, sigur Urd Johannesen, sum tískil ofta fer út til ymsu listafeløgini, tá ymiskt nýtt er at frætta innan eitt nú stuðulsmøguleikar og tíðarfreistir.

### Kulturkontakt Nord

Kulturkontakt Nord er nýggjur stovnur undir Norðurlandaráðnum og var stovnsettur í januar 2007.

Kulturkontakt Nord hevur til uppgávu at umsita, kunna og samskipa norðurlendska mentanarsamstarvið.
Stjóri á nýggja stovninum er íslendska Bergljot Jónsdóttir.

Norðurlandahúsini í Føroyum, Íslandi og Grønlandi og norðurlendsku mentastovnarnir í Ålandi og Finnlandi fingið til uppgávu at virka sum kunningarlið fyri listafólk og fyriskiparar.
Kontaktpersónur í Norðurlandahúsinum í Føroyum er Urd Johannesen

**Stuðulsskipanir**
Í mai 2007 byrjaði Kulturkontakt Nord sítt virksemi at taka ímóti umsóknum til nýggju stuðulsskipaninar.

Stuðul verður veittur innan innan trý høvuðsøki: flytføri (herundir til netverk) og búdeplar; mentan og list; og telduspøl.



*Urd Johannesen, verkætlanarleiðari, harmast fráboðaðu sparingarnar á jattani hjá Norðurlandaráðnum til mentan*

## Óvæntaðar sparingar

Eitt av endamálunum við at seta á stovn Kulturkontakt Nord var, at meir peningur skuldi fara til listarligar verkætlanir og minni til umsiting. Í løtuni letur stovnurin út við 35 milliónir krónur í listarligum stuðli, men Bergljót Jónsdóttir dylur ikki yvir, at tey kundi hugsað sær at havt meir pening at ráða yvir á hesum øki.

Tað verður tó neyvan av nøkrum í bræði. Herfyri frættist nevniliga, at fimm prosent verða skavað av játtanini hjá Norðurlandaráðnum til mentan, fyri at lata meir pening til arbeiðið við altjóðaøgerð. Avgerðin kom so dátt við, at formaðurin í nevndini fyri mentan og útbúgving, Lars Wegendal, legði frá sær alt fyri eitt.

Eisini Urd Jóhannesen harmast fráboðaðu sparingarnar, men vísir á, at hetta ikki nýtist at ávirka játtanina til stuðulsveitingar.

- Øll játtanin til mentan í Norðurlandaráðnum fer ikki til Kulturkontakt Nord, so vónandi koma sparingarnar ikki at raka virksemið við at stuðla mentanarsamstarvi og listaverkætlanum, sigur hon.

- Hinvegin haldi eg tað verða eitt sera keðiligt signal at senda út, at Norðurlandaráðið soleiðis velur at raðfesta mentan lægri enn onnur øki, sigur Urd Johannesen.

**ave**